**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 24. juni 2008, kl. $19^{00}$**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Pauli Trond Petersen, Jákup Oluf Hansen, Jóhan Hendrik Hansen, Marjun S. Olsen og Jóhan Simonsen.
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Mál 47.**
Áseting av almennum fundardøgum fyri seinna hálvár 2008.
J. nr. 2005-652
Skotið verður upp, at almennu fundardagarnir verða hesar dagar:
26. august, 23. september, 28. oktober, 25. november og 16. desember.

**Viðv. máli 47**
Í upprunaliga uppskotinum var fundur ásettur at vera 11. november. Av tí at hetta er sami dagur, sum bygdarráðsval verður, mælti borgarstjórin til, at nevndi fundardagur verður tikin burturúr.
Uppskotið einmælt samtykt.

**Mál 48.**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Bjørn á Heygum vegna Mariu á Heygum um sundurbýti av matr. nr. 233b til neystagrundir.
J. nr. 2005-582.
Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini sambært uppskoti frá EM Ráðgeving, dagf. 6. juni 2008.

**Viðv. mál 48.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 56.**
Tilmæli frá somu um umsókn frá Oskar Seloy og Annu Justinussen um sundurbýti av matr. nr. 4d.
J. nr. 2005-660
Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. mál 56.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 49.**
Tilmæli frá somu um umsókn frá Sp/f Selmar Nielsen Arkitektur um byggiloyvi til røktarheim á Grønanesi.
J. nr. 2005-663
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. mál 49.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 50.**
Tilmæli frá somu um møguligt keyp av húsum og ogn hús og ogn hjá Maju Nielsen, ávikavist matr. nr. 264b og 264a.
J. nr. 2005-008
Nevndin mælir til at bjóða Maju Nielsen 1,2 mió kr fyri matr. nr. 264b, 89,- kr/$m^2$ fyri tann partin av matr. nr. 264a, sum liggur omanfyri grundstykki hennara á Fitjum, og eitt av grundstykkjunum í Vestri.

**Viðv. mál 50**
Pauli T. Petersen mælti til, at málið verður viðgjørt fyri afturlatnari hurð.
Uppskotið einmælt samtykt.

**Mál 51.**
Tilmæli frá somu um byggisamtykt og bygdarskipan.
J. nr. 2005-568
Nevndin mælir til, at nevndin fær heimild til at leggja byggisamtykt og bygdarskipan fram til alment eftirlit.

**Viðv. mál 51**
Karl A. Olsen mælti til, at málið verður tikið av skránni, og sett á skránna til fyrsta bygdarráðsfund aftaná summarsteðgin.
Somuleiðis mælti hann til, eitt mál um atkomuveg á Heygum kemur inn, har sum mál nr. 51 var. Sí mál nr. 57.

**Mál 52.**
Tilmæli frá Mentunarnevndini um áheitan frá Jóannes Fonsdal um at leggja øki á Heygum av til minnisvarða.
J.nr. 2005-667
Nevndin mælir til at samtykkja áheitanina, treytað av at arbeiðið verður gjørt í samstarvi millum Teknisku deild og Mentunarnevndina.

**Viðv. mál 52.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 53.**
Tilmæli frá Trivnaðarnevndini um kostnaðarmeting av ístandgerð av sýslumanshúsunum.
J.nr. 2005-599.
Nevndin mælir bygdarráðnum til at gera neyðugu ábøturnar.
Loftið skal ikki takast í nýtslu, fyrr enn lyfta er fingin til vega. Tó skal el- og rørarbeiði gerast á loftinum.
Goymslurúm skal gerast undir trappuni ella í kjallaranum.

**Viðv. mál 53.**
Tilmælið einmælt samtykt. Upphæddin verður játtað av hesum kontum: 150.000 av íløgukontuni fyri almanna- og heilsumál og 300.000 av kontuni fyri kommunalu umsitingina.

**Mál 54.**
Tilmæli frá somu um umsókn frá Regin á Rógvi um byggiloyvi til seyðahús í bústaðarøki.
J.nr. 2005-513.
Nevndin mælir bygdarráðnum til, at samtykkja, at frá nú av verður ikki loyvi at byggja seyðahús, fjós o.l. í sethúsaøki.
Hinvegin átti kommunan at havt eitt øki uttan fyri sethúsaøki til endamálið.
Regin á Rógvi skal kunnast um kærumøguleika.

**Viðv. mál 54.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 55.**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn frá Jústinnus Leivsson Eidesgaard um stuðul til at útgeva kommunublað stutt undan kommunuvalinum, sum verður í november 2008.
J.nr. 2005-669.
Nevndin var samd um at mæla bygdarráðnum til at játta 20.000,-, sum skal takast av konto 690130 Studningur og aðrar útreiðslur.

**Viðv. mál 55.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Viðv. mál 57.**
Nýtt mál á skránni um atkomuveg á Heygum.
Málið var fyri á bygdarráðsfundi 22. apríl 2008. Síðani er komið fram til, at ráðiligast er at flyta vegin omaneftir smb. tekning, tí rottangi, steinseting o.a. er á upprunaliga økinum.
Mett varð, at upprunaliga uppskotið fór at kosta 102.000 kr. Flutta staðsetingin kemur væntandi at hava umleið sama kostnað.
Jákup Oluf Hansen mælti til, at eigararnir av matr. 230 og matr. nr. 231h, Petur Frank Joensen og Sveinbjørn Poulsen, standa fyri arbeiðinum at gera arbeiðsvegin og harumframt gjalda 25.000 kr. hvør Vestmanna Kommuna bindur seg til at gera atkomuvegin liðnan.
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin

Fundur lokin kl. 21.30.

Sign.:
Karl A. Olsen
Jón Mikkelsen
Pauli Trond Petersen
Jákup Oluf Hansen
Øssur Christiansen
Jóhan Hendrik Hansen
Marjun S. Olsen